

▲ Jennifer Lopez í gudinnu-kjólanum úr skyggjandi gulli.

▼ Sean Penn í svørtum klædningi frá Armani, svartari skjúrtu og svørtum slipsi. Ymsu tekstilini geva tó eitt stuttligt ljósspæl í klæðunum. Hann livir upp til orðini: »Don't wear black to look cool, wear it 'cause you are cool«



▶ Queen Latifah er ikki bangin at vísa seg, og her ger hon tað við mótarøttum silki og hópatals ásettum, skyggjandi steinum, sum veruliga hava fingið comeback í 2009.



▶ John Legend skilir seg út frá mongdini av svart og hvítt-klæddum monnum við hesum ørvísi, brúna klædninginum frá Prada. Til ber eisini at fara í ein myrkabláan ella gráan klæðning, fyri at skilja seg eitt sindur út.





◀ Scarlett Johanson, sum mangan er kosin vakrasta kvinnan á reyða teppinum, er her í einum violettum kjóla úr silki. Violett er somuleiðis ein av litunum fyri 2009. Sum tilhoyr hevur Johanson einar netsokkar, lakkskógvar, svart naglalakk og diamantsmúkkur. Áhugaverd samanseting.



▲ Beyonce til Oscar handanina í ár. Hesin kjólin varð av fleiri skýrdur at vera ársins Oscar-kjóli. Aftur síggja vit havfrúusniðið.



▶ Selena Gomez er í einum kjóla av silvurlittum paillettum. Pailletturnar eru uttan iva eitt mást hava í ár, og serliga í vetrarmótanum hava tær verið sera nógv frammi.



▶ Jennifer Aniston er altíð líka vøkur, her í einum kjóla frá Valentino. Hesin kjólin umboðar enn ein trend í 2009, nevniliga tað skyggjandi tekstilið, umfram steinar og krystall, sum glitur og pynt á puturlitta kjólanum.



◀ Allir reyðir litir hava verið at sæð í ár, men á reyða teppinum hevur tað serliga verið postkassareyði liturin, ið hevur verið ráðandi. Her er Katherine McPhee til Young Hollywood Awards í einum sera einføldum reyðum kjóla frá Reem Acra Resort. Tá liturin er so sjónskur, er ikki neyðugt við ov nógvum smálutum og tilhoyri.



▲ Aston Kutcher og Demi Moore eru Ivery og Ebony. Hann heilt í svørtum og hon í hvítum halterneck-kjóla við vøkrum smálutum.